

**FORMEL 1**
*Niels Une Dam*

# Áðrenn Sepang

**Klokkan 8.00 sunnumorgunin verður árliga Malaysiska formel 1 koyringin á Sepang breytini í Kuala Lumpur. Hetta er sjeyndu ferð koyrt verur á einari av teimum nýggjastu og mest avbjóðandi breytunum á formel 1 árinum.**




## Um Sepang

Umferðir: 56
Breytarlongd: 5,543
Skjótast umferð: Juan Pablo Montoya, 1 minuttur og 34,223 sekund
Longdin á koyringini: 310,408 km.
Vinnarar: Eddie Irvine (1999), Michael Schumacher (2000, 2001, 2004), Ralf Schumacher (2002) og Kimi Räikkönen
*Kelda www.forix.com*

## Dekkini eru jokarar

Nógvi hitin fer at vera ein stór avbjóðing fyri dekkini. Michelin og Bridgestone siga Sepang, vera eina tí størstu avbjóðingina í kappingarárinum. Breytin gerst millum 40 og 50 hitastig tá koyrt verur. Í ár ber ikki til at skifta dekk, so hetta krevur nógv av framleiðarunum.

Spenningurin er stórur um tað er Bridgestone ella Michelin sum hevur framleitt besta dekkið í ár? Ein annar spurningur er: hevur nakar framleitt eitt dekk sum ikki punkterar áðrenn teir 310 kilometrarnir eru koyrdir í brennandi hitanum?

## Nú skal bera ella bresta

Í brennandi hitanum í Kuala Lumpur, skulu formel 1 motorarnir standa sína harðastu roynd í nógv ár.

Við nýggju motorreglunum í, noyðast allir bilar, sum komu á mál í Avstralia fyri tveimum vikum síðan, at koyra við sama motori hetta vikuskiftið. Hetta kann gerast sera trupult, eftirsum hitin væntandi verður um 35 hitastig. Hetta er fyrstu ferð, at motorarnir skulu brúkast í tveimum koyringum.

Michael Schumacher (Ferrari), Nick Heidfeld (Williams/BMW) og Christian Albers (Minardi Cosworth). Komu ikki á mál í Avstralia, og hava tí skift motor. Eisini teir báðir BAR/Honda koyrararnir Takuma Sato og Jenson Button byrja við nýggjum motori. Í Avstralia valdu teir ikki at koyra á mál, fyri at fáa møguleikan at skifta motor. Í brennandi hitanum kann ein nýggjur motorur kanska avgera koyringina.



### Støður, Formel 1

***Koyrarar***

| Navn | Land | Merki | Stig |
|---|---|---|---|
| Giancarlo Fisichella | Italia | Renault | 10 |
| Rubens Barrichello | Brasil | Ferrari | 8 |
| Fernando Alonso | Spania | Renault | 6 |
| David Coulthard | Stórabretland | Red Bull | 5 |
| Mark Webber | Australia | Williams | 4 |
| Juan Pablo Montoya | Kolumbia | McLaren | 3 |
| Christian Klein | Eysturríki | Red Bull | 2 |
| Kimi Raikkonen | Finnland | McLaren | 1 |

***Bilar***

| Merki | stig |
|---|---|
| Renault | 16 |
| Ferrari | 8 |
| Red Bull | 7 |
| Wiliams | 4 |
| McLaren | 4 |

## Michael Schumacher í óvandari støðu

Síðan Sepang breytin í Kuala Lumpur varð tikin í nýtslu í 1999, hevur Michael Schumacher vunnið tríggjar av koyringunum, verið næstur í tveimum og einaferð endaði hann sum triðbestur. So hagtølini tala fyri einum heiðurligum úrsliti fyri týskaran.

Sjeyfaldi heimsmeistarin kemur til Malaysia í einari óvandari støðu: Við ongum stigum úr Avstralia, er Schumacher ikki milllum átta teir fyrstu í heimsmeistarakappingini.



Michael Schumacher rendi saman við Nick Heidfeld í Avstralia. Bilurin brotnaði og hetta varð endin á einum degi, har Schumacher hevði verið lítið sannførandi. Men sjálvur er hann jaligur um møguleikarnir fyri at klára seg væl í Kuala Lumpur. Hann vísir á at liðfelagin Rubens Barrichello, endaði á øðrum plássi, og avbjóðaði sostatt Renault bilarnir, sum endaðu á fyrsta og triðja plássi.